Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hava Pauli T. Petersen og Eyðun Hansen, boðað frá, at teimum barst frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 25. januar, og játtaði at møta. 2. tiltakslimur Elsi Christiansen fekk ikki fundarboð vegna seina fráboðan.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av tiltaksliminum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 163**
Talgildu Føroyar – um rakstur av tænastum á Vanganum
J.nr.: 8511002-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. januar 2023 uppskot um sáttmála millum Vestmanna Kommunu og Gjaldstovuna um rakstur av tænastum hjá Vestmanna Kommunu á Vanganum.
Árliga gjaldið er grundað á støðd á kommunu og verður sostatt kr. 70.000.

Nevndin samtykti einmælt rakstrarsáttmálan og at peningurin fer av játtanini hjá umsitingini.

**Viðv. 163**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 164**
Broytingar í byggisamtyktini.
J. nr. 102002-1-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 17. januar 2023 mál frá teknisku deild um broytingar í byggisamtyktini.

Uppskotnu broytingarnar eru hesar:

1. Viðarlundin: matr. nr. 148a og 149 leggjast sum frílendi.
2. Fjalsvegur: Geilin og frá Geilini niðan til Fjalsveg leggjast sum frílendi.
3. Matr. nr. 217 (har Geilin stóð) broytast frá sethúsaøki til alment frítíðarøki.
4. Fiskastykkið, partur av matr. nr. 187d, - broyta part frá almennum frítíðarøki til parkeringspláss og gøtu.
5. Matr. nr. 205ak, ímillum Bøgøtu 9 og 11, broytast frá sethúsaøki til almennan veg.
6. Økið við standmyndini av Ólavi á Heygum leggjast sum alment frítíðarøki.
7. Matr. nr. 282q (dagstovnurin Látipípan) broytast frá sethúsaøki til almennar stovnar.
8. Víðkan av sethúsaøki á matr. nr. 310b.
9. Víðkan av sethúsaøki á matr. nr. 205cs.
10. Sethúsaøki á matr. nr. 45z (hjá Dánjal Jákup Andreasen), j. nr. 102002-2-2022.
11. Tillagan av vinnuøkinum, har Maskinhøllin og brandstøðin eru.
12. Sethúsaøki á matr. nr. 300a - frá matr. nr. 300b niðan til vetrarhegnið.
13. Broyting av byggisamtyktini - friðaðu bygningarnir inni á Fitjum
    J.nr.: 8200002-6-2019 - Tekniska Nevnd mælir til at broyta ásetingarnar fyri øki og bygningar til miðstaðarøki.

Nevndin mælir til at góðkenna uppskotnu broytingarnar.

**Viðv. 164**
John Zachariassen skeyt upp fylgjandi broytingar
nr. 4. strika "parkeringspláss og gøtu" og skriva veg í staðin
nr. 5. strika "almennan" og einans skriva veg

Anja Haldansen skeyt upp
nr. 11. at víðka vinnuøkið, soleiðis at tað eisini umfatar moldgoymsluna.

Tilmælið hjá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt við broytingaruppskotunum frá John Zachariassen og Anju Haldansen.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:00

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Laila Haldansen |
| Anja Haldansen | Ingi Olsen | John Zachariassen |